

## KÍ fær nýggjan venjara

Tá KÍ komandi vikuskifti spælir við Margáir móti EB/Streymi, verður tað Eyðun Klakstein, sum stendur við stýrisvølin. Talan er tó ikki um nakran dramatikk í Klaksvík. Alexander Djordjevic, sum saman við Jákupi Mikkelsen stendur fyri liðnum í ár, er við KÍ-kvinnunum í Makedonia, har tær hava europiska uppgávu. Og tá Jákup Mikkelsen eisini er málmaður hjá KÍ, hevur leiðslan heitt á Eyðun Klakstein um at hjálpa til við venjingini hesa vikuna og vera á beinkinum í Streymnesi sunnudagin. Eyðun hevur í drúgt áramál virkað innan venjaratoymið hjá KÍ. Og í fyrraárið og í fjør stóð hann eisini á odda fyri besta mansliðnum eitt tíðarskeið. Hesa ferð verður talan tó bert um hendan eina dystin, at 36 ára gamli Eyðun Klakstein skal hjálpa Jákup Mikkelsen.



# 35 leikaraflytingar

**Ein rúgva av monnum nýttu høvi at skifta felag, nú flytingarvindeyga hevur verið opið. Hetta lat aftur mánadagin**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Mest umrødda flytingin er pappírini hjá Toda Jónsson, sum nú aftur liggja í KÍ. Seinast Todi Jónsson spældi í KÍ var í 1992. Árið eftir spældi hann í B36, og síðani hevur Todi Jónsson ikki verið at sæð í føroyskum fótbølti. Men 16 ár seinni er Todi aftur at finna í føroyskum fótbólti, og hevur hann longu skorað eitt mál.

### Hanus til HB

Eisini eru aðrar flytingar, ið hava vakt ans. Hanus Thorleifsson hevur skift frá einum havnarfelagið til hitt. Frá B36 til HB. Christian Restorff Mouritsen gjørdi sama skifti, bara øvugtan veg, tá hann skifti frá HB til B36.

Hjalgrím Eltør hevur gjørt eins og Todi Jónsson og flutt sítt leikaraloyvið til barndómsfelagið KÍ. Hann spældi áðrenn við NSÍ.

Ein leikari, ið er uppvaksin í NSÍ, men hevur verið í útlegd, er Christian Høgni Jacobsen, sum er komin heim eftir at hava verið í danska AB.

### Útisetar heim

Christian Høgni Jacobsen er ein av seks fótbóltsútisetum, sum hava flutt sítt leikaraloyvi heim. Hinir eru áðurnevndi Todi Jónsson, og so Páll Klettskarð, Oddmar Færø og Atli Danielsen. Eisini er Erling Jacobsen komin heim til Víking, men hesin fer niðuraftur, tá hann hevur spælt sjey landskappingardystir.

Onkrir flyta meðan aðrir gevast

Tað eru tó ikki allar broytingar, ið hava við sær, at leikarar skifta feløg. Egil á Bø er ikki longur partur av hópinum hjá EB/Streymi. Hann er fyribils givin at spæla bólt, men leikaraloyvi hansara er framvegis hjá barndómsfelagnum.

## TILGONG OG FRÁGONGD

Tað hevur staðið føroyskum fótbóltsleikarum í boði at skifta felag, nú flytingarvindeygað hevur verið opið seinasta mánaðin. Her er yvirlit yvir tilgongdina og frágongdina frá feløgunum í Vodafonedeildini.

**07 Vestur:**

Tilgongd:

| | |
|---|---|
| Jovan Panic | Serbia |
| Aco Pandurovic | Serbia |
| Tamba Yarjah | |
| Lewis Morris | |
| Jón Nielsen | HB |

Frágongd:

**AB:**

Tilgongd:

| | |
|---|---|
| Tróndur Sigurðsson | HB |
| Mortan úr Hørg | HB |
| Sakaris Ludvík Súnason | Danmark |
| Tórður Thomsen | NSÍ |
| Stig-Roar Søbstad | Korsvoll |

Frágongd:

| | |
|---|---|
| Rói Danielsen | Danmark |
| Janus Joensen | Danmark |
| Tummas Hans Rubeksen | FC Hoyvík |

**B36:**

Tilgongd:

| | |
|---|---|
| Odmar Færø | Brøndby |
| Dennis Holmberg | HIK |
| Christian R. Mouritsen | HB |
| Atli Petersen | ÍF |

Frágongd:

| | |
|---|---|
| Súni úr Hørg | VB/Sumba |
| Fróði Clementsen | EB/Streymur |
| Sam Malsom | Þróttur |
| Hanus Thorleifsson | HB |

**B68:**

Tilgongd:

| | |
|---|---|
| Jóhan Petur Poulsen | Danmark |

Frágongd:

| | |
|---|---|
| Bogi Gregersen | Skála |

**EB/Streymur:**

Tilgongd:

| | |
|---|---|
| Fróði Clementsen | B36 |

Frágongd:

| | |
|---|---|
| Egil á Bø | Givin |

**HB:**

Tilgongd:

| | |
|---|---|
| Rókur av F. Jespersen | Danmark |
| Hanus Thorleifsson | B36 |

Frágongd:

| | |
|---|---|
| Mortan úr Hørg | AB |
| Tróndur Sigurðsson | AB |
| Christian R. Mouritsen | B36 |

**KÍ:**

Tilgongd:

| | |
|---|---|
| Todi Jónsson | Byrjaður aftur |
| Atli Danielsen | Frem |
| Páll Klettskarð | Frem |
| Høgni Madsen | NSÍ |
| Hjalgrím Elttør | NSÍ |

Frágongd:

Eingin

**NSÍ:**

Tilgongd:

| | |
|---|---|
| Christian Høgni Jacobsen | AB |

Frágongd:

| | |
|---|---|
| Øssur Dalbúð | ÍF |
| Tórður Thomsen | AB |
| Høgni Madsen | KÍ |
| Hjalgrím Elttør | KÍ |

**ÍF:**

Tilgongd:

| | |
|---|---|
| Øssur Dalbúð | NSÍ |
| Kaj Ennigarð | Víkingur |

Frágongd:

| | |
|---|---|
| Hans Paule Petersen | Víkingur |
| Atli Petersen | B36 |

**Víkingur:**

Tilgongd:

| | |
|---|---|
| Hans Paule Petersen | ÍF |
| Erling Jacobsen | Frem |

Frágongd:

| | |
|---|---|
| Kaj Ennigarð | ÍF |